# Altjóða oljueygu hyggja móti Føroyum

**Føroyskar fyritøkur marknaðarførdu tvær oljuráðstevnur, sum verða í Føroyum í januar og oktober næsta ár, á oljumessuni í Aberdeen herfyri**

OLJUMESSA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*
*Myndir: Paul Kragesteen, Faroe Express*

Nú um dagarnar varð altjóða oljumessa í Aberdeen. Aftur hesaferð varð luttøka úr Føroyum. Hóast bert fáar fyritøkur og stovnar høvdu valt at vera við í ár, so varð kortini hildið skilagott at vísa flaggið - at vísa, at føroyingar framvegis hava álit á, at olja og gass skal vera funnið í undirgrundini í rakstrarverdugum nøgdum. Millum luttakararnar vóru Atlantsflog, Virkisráðgeving, Beras, Thor, Vága Floghavn, Skipafelagið Føroyar og Menningarstovan.

Sum skilst var luttøkan hjá føroyingum á framsýningini var væl eydnað. Fleiri av fyritøkunum høvdu nógvar vitjanir og fleiri fundir - bæði við gamlar kontaktir, men eisini við fleiri nýggjar, og sjálvt fyritøkur, sum ikki fingu sent umboð til Aberdeen vórðu eftirspurdar.

Føroyski básurin lá á ein hátt stak væl fyri, beint við høvuðsinngongdina, men tað var eisini lætt at yvirsíggja hann, tí stóru básarnir beint við høvdu lyndi at draga eygu og áhuga til sín. Men aktivu føroysku luttakararnir, lutakastini um ferðir til tey bæði oljutiltøkini, sum vera í Føroyum næsta ár og ein powerpoint framløga, ið vendi sær beinleiðis til øll, ið komu inn, gjørdi, at føroyski básurin varð væl vitjaður.

Serligur áhugi var um framtíðar royndarboringar og seismiskar kanningar.

Ein gamal og góður kenningur, Sofus Poulsen, fyrrverandi føroyski umboðsmaðurin í Bretlandi gav eina hjálpandi hond á básinum. Óneyðugt at siga er hann stak væl kendur, umframt at hann kennir og minnist fólk - eisini í oljuvinnuni víða hvar, sum hann hevur hitt fyrr. Av tí sama trekti hann eisini vitjandi til básin og til føroysku fyritøkurnar á básinum.




*Kjartan Kristiansen, stjóri á Menningarstovuni saman við Sofus Poulsen, fyrrv. umboðsmanni í Aberdeen*

# Skeivt at sleppa endanum nú

**– Um vit ikki vísa andlit og hava vónina um at finna olju við Føroyar, hvør skal so vísa okkum áhuga sigur Kenneth Rasmussen frá Beras í Runavík**

OLJUMESSA
*Jan Müller*
*an@sosialurin.fo*

– Vit halda tað vera skeivt at sleppa hesum, nú vit hava fingið fatur í onkrum endum sigur stjórin í Beras, Kenneth Rasmussen, sum hevur verið við til tær flestu oljumessurnar í Aberdeen seinastu árini. – Vit vita ikki, nær nakað veruligt hendir, nær eitt gjøgnumbrot verður, men eg eri sannførdur um, at tað fer at henda. Við hesum sipar Kenneth Rasmussen til komandi boringar á landgrunninum. Hann hevur stórar vónir til leitivirksemið, sum verður komandi ár. Og er tað m.a. hetta, sum er drívmegin, tá eitt felag sum Beras so trúliga er við á oljumessum. Fyri at vísa flaggið, fyri kundarøkt og fyri at vísa umheiminum, at vit sjálvi trúgva uppá eina oljuvinnu her á landi.

Sjálvur heldur Kenneth, at tað var meiri áhugi aftur fyri Føroyum nú enn tað hevur seinastu árini og er orsøkin helst 2. leitiumfar. Umboð fyri nøkur av teimum nýggju og stóru oljufeløgunum vitjaðu á básinum, eitt nú Chevron, sum er eitt av mest virknu feløgunum á Atlantsmótinum.

Hóast man hevur bíðað "leingi" eftir einum gjøgnumbroti í leitingini, so telist Kenneth millum teirra, sum halda, at tað kann geva úrslit av hava tol. Hann vísir á menningina av havnini og umstøðunum í Runavík. Her verður so bara bíðað eftir, at virksemi skal fara í gongd aftur. – Tað hevur so ligið í dvala í eina tíð, men eg haldi, at tað nú verður arbeitt við at skrúva tingini soleiðis saman aftur, at man kann vera klárur, tá tíðin er búgvin. At man ansar eftir ikki at missa førleikan til ta tíð.




*Føroyski básurin lá sera væl fyri*